# Vit eiga at hjálpa næstanum



**JÓLAHJÁLP** - Øll kunnu koma í eina støðu, har tað er torført at fáa endarnar at røkka saman. Tað kann vera orsakað av drúgvari sjúku í familjuni, um onkur doyr, missir arbeiði, ella um tú brádliga verður einligur forsyrgjari. Tá kunnu jólini verða steinur omaná byrðu, slær Annlis Bjarkhamar fast. Tí skipar hon nú fyri jólainnsavningini fyri familjur við trongum korum

Eydna Skaale

Fyri tey flestu eru jólini knýtt at gleði, hugna og ovmikið av øllum góðum. Men fyri summi elva jólini til stúran og trega. Tað eru nevniliga fleiri føroyskar familjur, ið eru so illa sperdar fíggjarliga, at tær rætt og slætt ikki hava ráð at geva børnunum eini siðbundin jól.

Annlis Bjarkhamar var við, tá sms í fjør lat 100.000 kr í jólahjálp. Og stóri tørvurin á hjálp gjørdi hana ovfarna.

- Vit fingu millum 160 og 180 umsóknir í fjør, og tað endaði við, at 100 familjur fingu 1000 kr í part. Tað vóru altso nógvar familjur, sum einki fingu, hóast tær høvdu tørv á hjálp. Og í fjør var tað als ikki lýst. Tí vænti eg, at tað í ár vísur seg at verða nógv fleiri umsóknir, heldur Annlis Bjarkhamar.

## Tá jólini eru tung

Ætlanin við jólahjálpini er ikki, at fólk skulu kunna keypa børnunum eina gávu fyri 2000 kr heldur enn 1500 kr. Ella at fólk kunnu fara frá einum góðum jólahaldi til eitt luksusjólahald.

- Hetta er fyri tær familjur, har endarnir ikki røkka saman, og har hvør dagur er ein harður dystur, fyri at fáa kabalina at ganga upp, vísir Annlis á.

Hon hevur ilt við at meta um, júst hvussu stórur tørvurin er. Men at hann er stórur, er hon ikki í iva um.

- Tá vit fingu so nógvar umsóknir í fjør, uttan at tað var lýst, so vænti eg, at vit fáa nógvar ferðir fleiri í ár. Eg giti, at einar 300 familjur eru so illa fyri fíggjarliga, at tær ikki klára jólini. Og tað kemur so at merkja jólini hjá umleið 500 børnum, um hesar familjurnar ikki fáa eina hjálpandi hond, greiðir Annlis frá.

## 2000 kr til hvønn

Annlis vónar, at fólk taka so mikið væl ímóti Jólahjálpini, at hvør einasta familja, sum hevur tørv á tí, kann fáa einar 1500-2000 kr. til jólini.

- Hjálpin verður latin sum gávukort, og á umsóknini ber til at seta kross við, hvat man hevur størstan tørv á, og hvørjar vørur gávukortið skal nýtast til. Summi hava kanska ikki ráð til jólamatin, meðan onnur ikki hava møguleika at geva børnunum eina jólagávu.

- Tað vera tí nakrir vørubólkar í at velja, og til ber eisini at viðmerkja tað á umsókini, um tørvur er á onkrum heilt øðrum, sum vit ikki hava hugsað um, sigur Annlis.

## Øll kunnu hjálpa

Tað serliga við hesum átakinum er, at øll, sum hava eitt sindur av orku og yvirskoti, kunnu hjálpa teimum, ið eru ringast fyri í okkara samfelag. Fólk kunnu flyta pening, senda sms og harvið lata 100 kr, ella sjálvi skipa fyri eini innsavning.

- Fólk hava verið sera positiv um, at hetta er ein innsavning, sum hjálpir illa støddum føroyingum. Vit eru skjót at hjálpa úti í heimi, og tað er eisini sera gott, tí neyðin er stór, men vit hava kanska lyndi til at gloyma okkara næstu, sum eisini hava tørv á eini hjálpandi hond, heldur Annlis.

Kjarnin í tiltakinum er at eggja fólki til at gera okkurt gott, og higartil hava áhugin og undirtøkan verið sera góð.

- Hetta er eitt 0 kr átak, sum merkir, at ongar útreiðslur eru av tiltakinum. Stovnar og fyritøkur lata tænastur og arbeiðstímar fyri einki, og tað ger, at allur tann innkomni peningurin fer óskerdur til endamálið.

Ætlanin er at gera hetta til eitt afturvendandi tiltak hvørji jól, tí tað verða altíð nakrar familjur, sum hava ilt við at klára útreiðslurnar, sum eru tengdar at jólunum.

- Hetta er ikki eitt serføroyskt tiltak. Slíkar jólainnsavningar eru eisini í t.d. Danmark og Noregi, og har er tørvurin eisini so mikið stórur, at tey langt frá megna at nøkta hann, greiðir Annlis frá.

## Tey, sum søkja

Annlis slær fast, at hetta ikki er ætlað teimum, sum klára seg, men teimum, sum veruliga eru í fíggjarligari trongstøðu. Og hon vónar, at fólk ikki eru ov stolt at søkja, um teimum tørvar hjálp.

- Øll kunnu koma í eina støðu, har tað verður fíggjarliga tungt, og har jólini gerast steinur omaná byrðu. Tað er als eingin olmussa í hesum tiltakinum, men bert ein hjálpandi hond millum næstar.

1. desember kemur umsóknarblaðið á heimasíðuna, sum eitur www.takk.fo, og saman við umsóknini skulu upplýsingar latast um, hvussu nógv er eftir um mánaðin, tá tað fasta er goldið, um tú ert einsamallur forsyrgjari ella um tú hevur maka, hvussu nógv børnini eru og hvussu gomul tey eru. Umsøkjarin skal eisini vátta, at allir upplýsingar eru rættir. Síðani verður ein heildarmeting gjørd av øllum umsóknunum, og tey, ið eru ringast fyri, fáa fyrst.

Um onkur av einhvørjari orsøk ikki kann søkja umvegis heimasíðuna ber eisini til at ringja á tlf 220000 og antin søkja munnliga ella biðja um hjálp til at fylla umsóknina út.

Allir upplýsingar verða sjálvandi í trúnaði. Umframt Annlis sjálva, hevur hon eisini sett eina nevnd, sum fer at taka dagar ímillum umsóknirnar. Men so skjótt ein avgerð er tikin og gávukortini eru latin, so verða allir upplýsingarnir burturbeindir, slær Annlis fast.

- Eg vóni, at innsavningin gevur nóg mikið til, at vit kunnu hjálpa øllum, sum hava tørv á hjálp. Vit hava sera lítla vitan um sosialu og fíggjarligu viðurskiftini í Føroyum, men alt bendir á, at tað eru ávísir bólkar, sum hava tað ringt. Tað hava vit hoyrt nógv dømi um í miðlunum seinastu tíðina.

- Onkur hevur spurt meg, um tað ikki er ein politisk uppgáva at taka sær av teimum, ið hava tað ringt. Tað er tað sjálvandi, men eg haldi, at vit øll hava eina medábyrgd. Síggja vit ein tørv og kunnu vit gera nakað, so eiga vit at gera tað, sigur Annlis Bjarkhamar.

eydnaskaale@hotmail.com

## Fakta um í mennsikjum góður tokki:

- Savnað verður inn frá 5. november til 11. desember
- Øll kunnu lata og skipa fyri smærri innsavningum
- Hjálpin er ætlað barnafamiljum, ið ikki hava ráð at halda eini vanlig jól við tí, ið hartil hoyrir
- Annlis metir at eini 300 familjur hava tørv á hjálp. Tvs at hetta merkir jólini hjá uml 500 børnum
- Søkjast kann frá 1. - 8. desember
- Umsóknarblað kemur út á www.takk.fo og ringjast kann eisini á 220000
- Annlis vónar at fáa umleið 500.000 kr inn, so øll kunnu fáa hjálp
- Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.